# UR AFRIKA





## Á AFTURPARTIN

*Suðuramerikansku spælararnir endaðu á afturpartinum, tá ið Týskland, Niðurlond og Spania spældu seg víðari í HM-kappingini*

Mynd: Polfoto

### Spania mátti stríðast

Paraguay kom á vøllin við einum heilt øðrum hugburði, enn tey flestu høvdu roknað við í fjórðingsfinaluni ímóti Spania. Paraguay pakkaði seg ikki á egnari hálvu, men fór langt fram á vøllin fyri at stressa sponsku spælararnar.

Hetta riggaði heilt væl til tíðir, og Spania slapp ikki at dominera dystin í so stóran mun, sum roknast kundi við frammanundan.

Dysturin gjørdist eisini dramatiskur, tá Paraguay í seinna hálvleiki fekk brotsspark, sum teir misnýttu. Ein minutt seinni fekk Spania brotsspark, sum teir eisini misnýttu. Og so endaði tað við, sum onkur mundi hava illgruna um. Eitt mál varð skorað, og tað gjørdi stóri spanski spælarin, David Villa.

Tað var nóg mikið til at senda Spania víðari í kappingini, men dysturin gav ábendingar um, at europameistararnir ikki eru so suverenir, sum teir onkuntíð hava verið.

### Hálvfinalur

Týskvøldið og mikukvøldið skuldu finalistarnir í HM-endaspælinum finnast. Týskvøldið skal Uruguay, sum er einasta landið uttanfyri Europa, ið er eftir í kappingini, spæla ímóti Niðurlondum. Hesi dysturin tykist verða púra opin, men tað er sjálvsagt ein missur fyri Uruguay, at málskjúttin Suares hevur leikbann. Men Forlán kann meira enn teir flestu, og Niðurlond skulu vísa saman áræði og avrik, sum teir vístu í seinna hálvleiki ímóti Brasil, skulu teir spæla seg í finaluna.

Helst meira spennandi hálvfinalan er millum Týskland og Spania. Fyri kappingina var Spania roknað sum fremsta umboðið hjá Europa, men Týskland hevur av álvara spílað seg út í hesi kapping og er helst lítil favorittur til dystin ímóti Spania mikukvøldið.

*eydun@sosialurin.fo*

ENDABRESTURIN

### Hálvfinalur

Týskvøldið kl. 19.30: Uruguay-Niðurlond
Mikukvøldið kl. 19.30: Týskland-Spania

### Dystur um 3. pláss

Leygarkvøldið kl. 19.30

### HM finala 2010

Sunnukvøldið kl. 19.30

## FLOPPLIÐIÐ

**ROBERT GREEN** (ONG)
Enski málmaðurin varð fyrstaval, men hann gjørdi so stórt mistak í fyrsta dystinum hjá Onglandi, at hann varð settur av og varð ikki at síggja aftur á vøllinum.

**NICOLAS OTAMNEDI** (ARG)
Var fullkomiliga útstillaður, tá ið Týskland rann Argentina um koll og mátti skiftast út. Har hevði verið gott við tí meira roynd Javier Zanetti, men hann varð ikki tikin út.

**JUN NI** (N. KOR)
Hann misti bóltin átta ferðir, tá ið Portugal høvlaði Norður Korea av. Gudviti, hvussu móttøkan av honum heima í Norður Korea mundi verða.

**ERIC ABIDAL** (FRA)
Sum nógvir av fronsku stjørnunum spældi hann illa, var ótryggur í verjupartinum og kláraði at gera brotsspark.

**PATRICE EVRA** (FRA)
Vanliga er hann ein sterkur og álopssinaður bakkur hjá Manchester United, men sum liðformaður hjá Fraklandi dumpaði hann bæði á og uttanfyri vøllin.

**LIONEL MESSI** (ARG)
Jú, hann er helst tann spælarin á hesum liðnum, sum spældi best í endaspælinum, men tá hugsað verður um, hvørjar vónir vóru til hansara, livdi hann ikki upp til tað.

**FRANCK RIBERY** (FRA)
Vanliga er hann besti franski fótbóltsspælarin, men hann endaði sjálvur í rokinum um, hvør skuldi spæla og ikki og varð eisini avsettur av liðnum, har hann skuldi verða stóra kreativa orkan.

**JON DAHL THOMASSEN** (DAN)
Hann hevur áður gjørt um seg millum heimsins bestu spælararn, men hesaferð gjørdist tað øllum greitt, at Jon Dahl er ikki tað, hann einaferða. Innarasíðan er pensiónerað.

**FERNANDO TORRES** (SPA)
Hann hevur verið órógvaður av skaðum og hevur virkað óskarpur og ómótiveraður higartil tí kappingini. Nú hevur hann tveir dystir eftir at gera um seg í.

**WAYNE ROONEY** (ONG)
Tað skuldi verða so gott, men gjørdist so keðiligt. Rooney hevur verið stóra stjørnan í Europa í farna kappingarárið, men hann formáddi sær einki á enska landsliðnum hesaferð.

**NICOLAS ANELKA** (FRA)
Skommin var fullkomin, tá ið Anelka varð sendur heim frá HM-endaspælinum, tí hann var ljótur í munninum við venjaran. Á vøllinum gjørdi hann heldur ikki stóru skreytirnar.

**VENJARI: RAYMOND DOMENECH** (FRA)
Hvør annar enn Domenech kann verða venjari fyri floppliðið. Hansara menn gjørdu sær fyri skommum í HM – bæði á vøllinum og uttanfyri vøllin.

## Stóru stjørnurnar funnu ikki málið

Teir teljast millum dýrastu og best løntu fótbóltsspælararnar í heiminum, og roknað varð við, at teir skuldu seta síni fingramerki á HM-endaspælið í Suðurafrika. Summir spældu hampuliga væl, aðrir minni væl, men felags fyri nógvar av teimum størstu stjørnunum er, at teir skoraðu einki mál í HM-endaspælinum.
Hvør hevði fyri endaspælið torað at sagt, at Messi, Rooney, Kaká, Henry, Lampard og Ribery fóru ikki at skora nakað mál í HM. Ikki júst tann mest gløgga eygleiðingin fyri HM, men eitt faktum, nú endaspælið gongur ímóti HM.